# - Tað er ein meining í boðskapinum

**- Eg havi verið fleiri ferðir áður í Føroyum. Júst, hvussu ofta veit eg ikki. Men eg eri sera spentur at koma aftur higar, sigur norski prædikumaðurin, Anfinn Skaaheim. Um vikuskiftið verður hann høvuðstalari á stórmøtum í ítróttarhøllini í Havn.**

MØTIR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Vit mugu síggja um føroyingar skilja mín norska humor. Men tað sum kortini týðir mest er, at fólk kenna seg aftur og veruliga hoyra gleðiboðskapin, sigur norðmaðurin, Anfinn Skaaheim, sum um vikuskiftið talar á stórmøtum í Havn*

*Mynd: Trúboðin*

**Havn:** - Ja eg gleði meg at hitta vinir og sjálvandi eisini at tala Guds orð, sigur Anfinn, sum í juli mánaði fór um tey 67 árini.

Hann hevur talað og luttikið á einum ótali av kristnum fundum í Noregi og øðrum londum. Nú kemur hann enn einaferð til Føroya sum gestur hjá Heimamissiónini.

Hesaferð kemur hann at tala við trý stórmøti, sum verða hildin í Havn um vikuskiftið. Byrjað verður í kvøld og hildið verður á til sunnukvøldið.

Evnið við hesi møtini er "Fylg Jesusi", og verður hetta eisini lýst í sangi, vitnisburði og í samtalum manna millum.

- Leiðarar í øðrum átrúnaðum eru deyðir, men Jesus livir. Tí gevur tað meining at fylgja Honum. Hann er einasti vegurin, sigur Anfinn Skaaheim í samrøðu við Trúboðan, málgagnið hjá Heimamissiónini.

Umframt stórmøtini á Hálsi fer hann eisini at prædika við gudstænastuna í Vesturkirkjuni sunnudagin.

### Endamálið

Tá Anfinn hevur verið her áður, hevur hann m.a. undirvíst á bíbliuskeiðum og hevur talað á møtum, og haraftrat luttikið á fundinum í norðurlendskum høpi.

Hann hevur í sínum langa lívi eisini talað fleiri ferðir á stórmøtum. Men hetta er fyrstu ferð hann talar við stórmøtir á føroyskari jørð.

- Tað er altíð spennandi við slíkum stórmøtum, og eg gleði meg at tala her hjá tykkum.

- Vanliga hava føroyingar ikki trupult við at skilja mítt norska mál, og eg vóni tí ikki at tað verður nakar trupulleiki hesaferð, sigur hann.

Hann er kendur fyri at duga væl at tala, og tað kemur meiri enn so fyri at hann sigur okkurt skemtiligt, so fólk fara at flenna. Um hann fer at gera tað í samband við hesi møtini, veit hann ikki at siga enn.

- Vit mugu síggja um føroyingar skilja mín norska humor. Men tað sum kortini týðir mest er, at fólk kenna seg aftur og hoyra boðskapin, soleiðis at tað kann blíva teimum til frelsu ella endurnýggjan, sigur hann.

### Viðurkenning

Anfinn Skaaheim hevur drúgvar royndir sum talari og inn leiðslu av kristnum felagsskapum.

Hann hevur verið aðalskrivari í missiónsfelagsskapinum Normisjon, í Indremisjonsselskapet og í kristna arbeiðinum millum tey lesandi í Noregi.

Hetta arbeiðið hevur givið honum túsundtals vinir í heimlandinum og í øðrum londum. Og alt hetta er hann eisini heiðraður fyri.

Tá Normisjon hevði ársfund sín í summar fekk Anfinn handaða Kongens fortjenstmedalje í gulli fyri trúfasta arbeiðið sítt innan kristiliga økið.

Hetta kemur púrasta óvart á hann. Men hann vísti beinanvegin heiðurin á rætta stað:

- Hesin heiðurin snýr seg ikki bert um mítt arbeiði. Eg meti heiðurin sum eina viðurkenning og uppmuntring til arbeiðið hjá missiónini, segði hann, tá hann fekk henda heiðurin sýndan.

# Norðoyingar halda ferðini

**Eitt yvirlit frá Landsverki vísir, at nógv tann størsti parturin av bilførarunum i Norðoyggjum halda seg innan fyri lógarinnar karmar. Bert hendinga bilar koyrdu omanfyri 100 km/t eina ávísa viku í fjør.**

FERÐSLA
*Snorri Brend*

**Norðoyggjar:** Fyri sløkum ári síðani varð gjørd ein serstøk teljing av ferðsluni, sum koyrdi eftir tunnilsvegnum í Klaksvík.

Henda mátingin vísti, at í viku 37 í 2005 koyrdi í miðal 2720 bilar eftir hesum vegastrekkinum.

Men mátingin vísti eisini ferðina hjá klaksvíkingum og øðrum bilførarum í Norðoyggjum. Í hesi kann ein bara staðfesta, at teir allarflestu koyrdu niðanfyri 80 km/t.

Staðfestast kann nevniliga, at væl omanfyri 80 % teirra hildu seg til ásetingarnar í ferðslulógini um mest loyvdu ferð.

Tíggjundi hvør bilførari koyrdi millum 80 og 90 km/t og eini 5 % millum 90 og 100 km/t.

### Onkur koyrir skjótt

Hinvegin so vísti kanningin, at tveir av hvørjum hundrað bilførarum koyrdu omanfyri 100.

Í mátingini verður hetta sett í básin "100 til 180 km/t", men einki verður sagt um at nakar koyrdi upp ímóti ovara markinum.

Mesta ferðslan eftir tunnilsvegnum er ikki óvæntað um 5-tíðina seinnapartar, tá fólk er ávegis til hús eftir loknan arbeiðsdag.

Nevnast kann, at mesta ferðslan var í januar mánaði, tá millum 3000 og 3500 bilar koyrdu í miðal eftir hesum vegastrekki.

## STUTT SAGT

### Dagrøkt í nýggjum húsum



*Klaksvíksbørn fáa betri umstøður í dagrøktini*

**Klaksvík:** Eftir at hava leitað í eina tíð, hevur Klaksvíkar Kommuna nú keypt eini stór sethús í býnum við tí endamáli at betra umstøðurnar hjá teirri kommunalu dagrøktini.

Ætlanin er, at spælistovan hjá dagrøktini skal halda til í húsunum, sum geva dagrøktini møguleikar at skipa gestarøktina betur enn higartil.

Rúmligu húsini fara eisini at hýsa húsavørðinum hjá barnaansingarskipanini, umframt annað virksemi, sum endalig avgerð ikki er tikin um enn.

- Hetta er ein kærkomin bati fyri dagrøktina. Hetta fer at geva eina betri tænastu til brúkararnar av dagrøktarskipanini við eini rúmligari spælistovu, og har umstøður verða til at skipa gestarøktina betur enn higartil, sigur borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen við heimasíðuna hjá kommununi.

Teir hava í eina tíð kannað møguleikarnar fyri at betra umstøðurnar hjá spælistovuni, men tað hevur gingið heldur striltið at funnið røttu loysnina.

Kommunan byggir í løtuni nýggjan barnagarð til 60 ansingarpláss við, sum ætlandi verður liðugt bygdur komandi summar. Annars fevnir kommunala dagrøktin um 120 dagrøktarpláss.

**sb.**

### Vísa vøkru støðini til ferðafólk



*Fjallasmáttan liggur væl fyri, og er væl umtókt av teimum vitjandi*

**Sandoy:** At Sandoyggin er vøkur og hevur nógv at vísa teimum vitjandi, vita tey á Sandoyar Kunningarstovu alt um.

Fyri at geva øðrum møguleika at uppliva hetta sama hevur verið skipað fyri ymiskum útferðum í oynni í summar. Onkrir túrar hava verið fyriskipaðir, meðan aðrir eru bílagdir.

Hesir túrar ganga til ymisk støð í oynni, og eisini til Skúvoyar. Skipað hevur eisini verið fyri kvøldsetum í Dali.

Ein av teimum meiri forkunnugu og væl umtóktu túrunum hevur verið hann til Slavansdal, hagar farið verður úr Skopun. Her finst ein fjallasmátta,har tey vitjandi kunnu bíleggja sær mat eftir loknan gongutúr.

Nú summarið er farið at halla varð kortini skipað fyri einum túri mikukvøldið. Hesin túrurin gekk til Núpsdals í Skálavík.

Til henda túrin høvdu eini 20 fólk teknað seg. Veðrið var gott, men tað var heldur kølið. Aftaná var ein leskiligur biti at fáa í Kelduni í Skálavík.

**sb.**

### Tveir sparkivøllir til børnini

**Klaksvík:** Børnini í Klaksvík kunnu so smátt byrja at gleða seg tveir sparkivøllir aftrat í býnum.

Klaksvíkar kommuna er nevniliga farin undir byggibúgving av tveimum slíkum vøllum, einum á Norðoyri og einum undir Grashjalla. Kommunala arbeiðið skal vera liðugt um góðar tvær viku, tí tá verður sjálvt graslíkið lagt á av serfrøðingum úr Danmark.

Vøllirnir eru 13 ferðir 21 metrar til støddar, og er graslíkið av sama slagi sum tað í Djúpumýru, har KÍ leikar sínar heimadystir.

Tað er FSF, sum vegna UEFA letur vøllirnar. Kommunali parturin er at lata lendið, fremja jørðarbeiðið og gera betonggarð undir girðing og ljós. FSF útvegar og áleggur graslíki og skeltini. FSF stuðlar eisini arbeiðið at gera girðing kring vøllin.

Fyri kommununa kostar hvør vøllurin einar 300.000 kr.

**sb.**